# Teitur eftir Eivør

**Tað riggaði væl at hava dupultkonsert við teimum báðum Eivør og Teitur, sum allar Føroyar eru uppá fornavn við. Norðurlandahúsið fyltist fríggjakvøldið, og framførslan fylti tey uppmøttu**

listastevna føroya 2001

LISTASTEVNAN
*Rúnar Reistrup*



Bert aftasta røð í teirri talmerktu stólarúgvuni í konserthøllini í Norðurlandahúsinum var tóm, tá lív kom í trummurnar, kontrabassin og el-guitaran, sum stóðu á pallgólvinum.

Bæði Eivør og Teitur, sum annars eita Pállsdóttir og Lassen til eftirnavn, valdu at brúka tann intima konsertstílin har tónleikararnir standa og sita í klingru og ikki gera stórvegis um seg, meðan teir spæla.

Bæði høvdu tríggjar tónleikarar við sær, og teir brúktu tey somu trý ljóðførini. Men so líktust framførslurnar heldur ikki meir.

Eivør, sum hevði Brand Jacobsen, Mikael Blak og Leiv Thomsen við sær á ávikavist trummum, kontrabassi og el-guitara, sang fyri tað mesta fólksliga løg av fløguni hjá sær. Brandur, Mikael og Eivør hava spælt nógv saman, meðan Leivur Thomsen er nýggjur í høpinum. Og hóast tað onkuntíð hoyrdist, at Leivur var tann »nýggi« í bólkinum, so megnaði hann væl ta nokkso krevjandi uppgávuna, sum tað er at koma inn í júst hetta høpið.

Eivør, sum fekk onkran at gníggja eyguni tá hon kom fram á pallin í føroyskum skjúrti og belti, men við gjøgnumskygdari reyðari nylontroyggju og berføtt, var sum altíð væl uppløgd. Hon eksperimenteraði stundum við røddini, og skifti millum at bergtaka og taka á bóli áhoyrararnar.

Framførslan hjá Eiovør endaði við at Leivur Thomsen og Brandur Jacobsen hvør í sínum lagi sluppu at folda seg út á ljóðførum sínum við langum solospæli, har teir góvu nakrar lekrar bitar frá sær.

### Jazzurin livir í Teiti

Eftir ein steðg kom Teitur á pallin við teimum báðum donsku tónleikarunum Andreas Marcus á bassi og Mads Andersen á trummum. Við sær hevði hann eisini Leiv Thomsen, sum soleiðis var á pallinum alt kvøldið.

Teitur skemtaði við at Leivur fyrr hevur verið hansara guitarlærari, og áhoyrararnir kundu bara staðfesta, at okkurt hevði hann lært. Umframt at vera góður sangari og sangskrivari er Teitur eisini sera stinnur á guitarinum. Tað gevur honum eitt størri rásarúm at spæla við løgunum á konsertframførslum, og hann brúkti hendan møguleika til fulnar í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið.

Teitur hevur vent sær til poppin aftur, men tíðin sum jazztónleikari hevur sett síni týðiligu spor og bjargar honum stundum frá at gerast ov sukursøtur í teimum vøkru romantiksu løgunum, ið hann serveraði á silvurfati á konsertini.

Í konsertini hjá Teiti var Leivur Thomsen á heimavølli og kom nógv betur til sín rætt. Saman við Teiti bar hann konsertina við royndari hond á guitararminum.

Teitur fekk hjálp frá Eivør til eitt av løgunum, og saman sungu tey eisini kenda føroyska lagið »Mær leingist« sum eykalag og sendu síðan áhoyrarnar út úr konserthøllini, hungrandi eftir meira.

Tað hevði verið gott um Teitur og Eivør kundu framført eitt sindur meira saman hetta kvøldið, eftirsum at tey nú vóru í sama húsi um somu tíð, men tað er skiljandi at tey helst vildu framføra tað mesta hvør sær.

# Bubbi framførdi lívsins tatoveringar

**Bubbi segði søgur og sang sangir frá síni langu tónleikakarrieru, tá hann var á pallinum í Altantis fríggjakvøldið. Krúnurakaði og tatoveraði tónleikarin spældi bæði eymar balladur og rockkendar vísur**

listastevna føroya 2001

BUBBI
*Eyðun Klakstein*

Fríggjakvøldið kom íslendingurin, Bubbi Mortens, aftur til Klaksvíkar. Miðskeiðis í sjeytiárunum búði hann eitt skifti í Klaksvík, og hann hevði ongantíð verið aftur í Klaksvík síðani. Ikki fyrr enn nú Listastevna Føroya dróg hann til landið.

Bubbi Mortens hevði konsert í fullsettum sali í mentanarhúsinum, Atlantis, og konsertin gjørdist eitt frálíkt tónleikaligt upplivilsi. Bubbi var væl fyri, prátaði væl upplagdur millum sangirnar, argaði danir, og spældi eisini eitt breitt úrval av sínum mongu sangum.

Vísumenn úr Klaksvík løgdu fyri á konsertini. Jógvan Hansen, Hans Hjalti Skaale og Sjúrður Ravnsfjall spældu í einar 25 minuttir, áðrenn íslendska høvuðsnavnið kom á pallin. Vísumenn spæla fólkatónleik, og framførsla teirra var ein góð byrjan á kvøldinum. Ikki minst sanguirn um tær sjey drykkjunæturnar riggaði væl.

Vísumenn høvdu eisini týtt ein av kendastu sangunum hjá Bubba til føroyskt, og teir framførdu sína egnu útgávu av sanginum, Tað er gott at elska. Hendan sangin spældi Bubbi ikki á konsertini.

### Harður og eymur

Bubbi var væl fyri, tá hann kom á pallin. Hann er herðabreiður, krúnurakaður og hevur fleiri tatoveringar á kroppinum. Hann líkist einum meira einum útblakara enn einum vísutónleikara, men soleiðis ber til at fara skeivur, um tú skoðar hundin á hárinum.

Bubbi spældi sangir frá ymsum tíðarskeiðum í síni drúgvu tónleikakarrieru, og hann greiddi frá ymsum upplivingum, sum hann hevði havt gjøgnum sítt stundum harða lív. Fleiri av teimum kendu sangunum hjá honum vórðu ikki spældir, men hann fyri tað hevði ovmikið av góðum sangum at bera temum stívliga 100 áhoyrarunum.

Bubbi greiddi eitt sindur frá síni tíð í Klaksvík, men hann helt speiskliga fyri, at hann mintist so lítið frá hesi tíð, tí hann gekk fyri tað mesta í eini rústoku. Men hann helt, at tað var stuttligt at verða aftur í Klaksvík og sleppa at spæla fyri klaksvíkingum.

Bubbi greiddi frá teimum sangunum, sum hann fór at spæla. Áhoyrarnir fingu nógvar áhugaverdar søgur, og hann spardi ikki danir. Hann helt, at danska málið var so komiskt, at eingin kann taka danir í álvara. Hann segði, at tá hann var í ringum lag, so plagdi hann at lurta eftir donskum rocktónleiki, tí so flenti hann í kíki. Danskur rockur var best í 20'unum og 30'unum, helt hann speiskliga fyri.

### Góður sangari

Tíðliga á konsertini spældi Bubbi eitt av sínum vakrastu løgum – tann yndisliga Sem aldrei fyrr – og í tí sanginum varð munnharpan eisini tikin við í spælið.

Bubbi spældi eisini Havi staðið við gluggan, sum Kári P. so meistarliga hevur týtt til føroyskt, og millum aðrar stillar sangir var eisini ein vøgguvísa til kvotagreivar, sum snýr sum tey fólkini, sum eiga stóra part av fiskinum í havinum kring Ísland.

Men Bubbi var ikki bara friðarligur, hann setti eisini ferð á við góðum gittarspæli og eini rødd, sum eisini kláraði at syngja við stórari orku. Trúir tú á engla var ein frálíkur sangur, har Bubbi vísti, at hann er frálíkur sangari.

Millum søgurnar, sum Bubbi segði frá, var ein um eina unga gentu, sum hann kendi úr Reykjavík. Hon hevði búð og vunnið pengar á gøtuni í íslendska høvuðsstaðnum, men hon doyði longu sum 17 ára gomul. Hesin sangurin, Láttu sem tú sofir, var sterkur og inniligur.

Tað vóru nakrar av lívsins tatoveringum, sum Bubbi framførdi á pallinum í Atlantis fríggjakvøldið, og hann setti punktum við einum væl svingandi sangi, sum hevði sín uppruna á Cuba.



# Varðveita røturnar í tónleikinum



**Bæði Prix Føroyar vinnararnir, Clickhaze, og stóri grønlendski bólkurin í løtuni, Chilly Friday, eru samdir um, at tað hevur stóran týdning at varðveita sínar røtur innanfyri tónleikin. Bólkarnir báðir hava so avgjørt okkurt til felags, hóast tað kanska ikki altíð liggur líka væl fyri at samanbera**

TÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*
*Mynd: Bárður Eklund Johansen*

Á Hotel Føroyum hava vit sett tveimum tónleikabólkum stevnu. Hesir báðir bólkar eru høgt í metum í hvør sínum landi. Clickhaze er úr Føroyum og Chilly Friday er úr Grønlandi. Báðir bólkarnir hava vunnið tónleikakapping í heimlandi teirra. Í Føroyum vunnu Clickhaze Prix Føroyar. Chilly Friday vann eina kapping í Grønlandi, sum uppá fleiri mátar minnir um Prix Føroyar, men kappingin er kortini ikki heilt tað sama. Henda leygardagin sita allir fimm úr Chilly Friday og trý umboð frá Clickhaze. Tað skal eisini sigast, at sjónarmiðini hjá hesum fyrst og fremst eru teirra egnu sjónarmið ikki sjónarmiði hjá øllum bólkinum.

Tá fyrsti spurningurin er spurdur, kemur beinanvegin gongd á prátið, og blaðmaðurin roynir at fylgja, tí tað er greitt, at hesir báðir bólkar hava nógv til felags og nógv at práta um.

### Stórir

Tað eru kanska ikki nógv fólk í Føroyum, ið kenna Chilly Friday. Støðan í Grønlandi er tó ein heilt onnur, tí har eru teir so at siga tann »størsti« bólkurin. Chilly Friday er mannað við grønlendingum, og tað er eisini í Grønlandi, at bólkurin fyrst og fremst hevur spælt.

Fløgan hjá teimum hevur selt eini 4000 eintøk, og hetta er at rokna sum met. Sovorðin tøl hoyra til tað ógvuliga sjáldsama - eisini í Føroyum.

Bólkurin vann eisini eina tónleikakapping í Grønlandi. Henda kapping verður samanborin við Prix Føroyar, men kappingarnar eru tó ikki heilt tær somu. Sjálvir siga teir í Chilly Friday, at tað kendist sum um, at teir ikki luttóku, tí teir fóru bara á pallin einaferð, og síðani høvdu teir vunnið.

Í øllum førum vann bólkurin hesa góðu kapping, og ein partur av vinninginum var at sleppa uttanlands at spæla. Í hesum sambandinum hava teir lagt leiðina framvið Føroyum, men teir hava eisini spælt á so frægum støðum sum í Tivoli.

Sjálvir siga teir tað vera stuttligt at sleppa út um teirra egna land við teirra tónleiki, og tað er so avgjørt eisini eitt ynski at sláa ígjøgnum uttanlands, hóast hetta ikki er høvuðs endamálið.

Chilly Friday spælir eitt slag av rokktónleiki, sum minnir einamest um amerikanska rokktónleik. Henda sambanbering skal standa fyri egna rokning. Leygardagin var tað eisini onkur sum bar fram, at tónleikurin hjá Chilly Friday hevði nakað serstakt grønlendskt í sær.

Higartil hevur bólkurin givið eina fløgu út, men teir hava ætlanir um at fara í upptøkuhøli seinni í hesum árinum.

Manningin telur fimm, og teir eru: Jan De Vroede, klaver, Henrik Møller Jensen, bass, A. Larsen, gittar, Alex Andersen, trummur og Malik Kleist, sang.

### Røturnar

Tá spurt verður um uppruna og endamál hjá hesum báðum bólkunum, so eru svarini eitt sindur ymisk. Clickhaze er í stóran mun sprotið úr øðrum bólkum, og tað lá eisini meira ella minni ein hugskot aftanfyri bólkin. Hetta hugskot var, at gera teirra egna tónleik. Tónleikurin skuldi ikki vera tann vanligi konsert tónleikurin í Føroyum, og hann skuldi vera egin og góður.

Limirnir í Clickhaze vísa á, at tey eru rættiliga ymisk tónlistarliga, so tey umboðaðu eina rættiliga blanding.

Bólkurin hevur eisini skift kós eitt sindur við tíðini, men tað hevur altíð verið eitt aðalmál at »halda fast í« í rótunum. Í hesum sambandi nevna teir eisini fløguna hjá Sepultura »Roots« sum íblástur.

Tað kemur veruliga glið á práti, tá íblástur kemur upp at venda, og tað vísir seg, at íblásturin, sum bólkarnir hava fingið, kemur oftani frá teimum somu bólkunum.

Hjá Chilly Friday snýr tað seg fyrst og fremst um at gera góðan tónleik, siga teir. Bólkurin er heldur ikki so øgiliga gamal. Teir hava eina spæligleði, sum er grundleggjandi motivatiónin aftanfyri bólkin. Teir kunnu ikki liva av at spæla tónleik í Grønlandi, hóast teirra seinasta fløga hevur kastað eitt sindur av sær.

Báðir bólkarnir eru samdir um, at tað hevði verið stuttligt og spennandi at sligið ígjøgnum uttanlands, men hetta er ikki teirra høvuðsmál.

Tankin um at gerast eitt produkt er ræðandi fyri bólkarnar báðar.

-Dreymurin er ikki at koma uppá eina plakat, men heldur at sleppa at gera tað, sum man elskar, sigur Petur Jensen úr Clickhaze.

-Største dreymurin er at liva av tónleikinum onkrastaðni í verðini, siga teir í Chilly Friday.

Bólkarnir tykjast á einum máli um, at tað skal nógv til at sláa ígjøgnum, men teir ætla tó ikki at sleppa rótunum av hesari orsøk.

### Ber ikki til at samnbera

Tá limirnir í teimum báðum bólkunum verða bidnir um at siga eitt sindur um tónleikastílin hjá hvørjum øðrum, eru teir skjótir at svara.

-Tykkara tónleikur er ógvuliga tvíbýttur, og tit hava samstundis tykkara heilt egna tónleikastíl, sigur trummusláarin í Chilly Friday.

-Eg haldi so avgjørt, at tú kanst hoyra nakað grønlendskt í tykkara tónleiki, sigur Jón Tyril úr Clickhaze.

Bólkarnir eru eisini rættiliga ymiskir. Tað verður eisini ført fram, at Clickhaze kanska meira arbeiða í myndum við teirra ljóði enn Chilly Friday.

Clickhaze syngja so at siga einans á enskum, meðan Chilly Friday hevur onkran grønlendskan tekst.

-Hóast tú kanska ikki slært ígjøgnum við at hava grønlendskar tekstir, so er hetta nakað, sum vit hava valt at gjørt, siga teir í Chilly Friday.

Hjá Clickhaze er tað serliga Petur Jensen, sum stendur fyri at skriva tekstir. Jón og hini í bólkinum hava eisini oftani heitt á hann um at gera meira við at skriva føroyskar tekstir. Jón sigur, at tað kennist eitt sindur falskt at standa á pallinum og syngja enskar sangir.

Tað lagið, sum er vorðið ein sonn landaplága í Grønlandi hjá Chillu Friday er á grønlendskum. Limirnir í Clickhaze at fara at gera meira føroyskar tekstir, men teir mugu taka í egnan barm, tá tað skal leitast eftir orsøkini.

-Eg haldi meg ikki til at skriva tílíkar tekstir á føroyskum. Tað kennist bara ikki nóg gott, sigur Petur Jensen um orsøkina til, at teirra tekstir eru á enskum.

Málið er ein munur á báðum bólkunum, men hetta er samstundis heldur ikki tann einasti. Meðan prátið gongur uppá tað besta, og samanberingarnar gerast betri og betri, so letur tað frá klaverspælaranum hjá Chilly Friday, at tað í veruleikanum ikki ber til at samanbera, tí bakgrundirnar eru so ymiskar. Tað finst bara entin góður tónleikur ella vánaligur tónleikur, sigur hann, og hinir taka allir undir við honum, so lata vit tað standa við hesum.

